FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 28. september 2022
J. nr.: 22/17008
Viðgjørt: JEK

Svar til fyrispurning nr. 52-036/2022 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um skattamál viðvíkjandi Samherja

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvat er hent í málinum um skatt hjá útlendska reiðarínum Samherja, har føroysk feløg og FAS-skipanin vórðu brúkt til at sleppa undan skatti uppá 17 mió. krónur?
2. Hvør er órættaður, og er endurgjald goldið til órættaðar partar?
3. Hvør revsing er framd mótvegis reiðarínum fyri at bróta skattalógina?
4. Finst dømi um nakran vanligan borgara, sum ikki verður revsaður, tá ið tað er staðfest, at tey hava brotið skattalógina?

Svar til spurning 1-4
Tað er ásett í § 151 í skattalógini, at tað er bannað skattavaldinum undir ábyrgd í borgarligu revsilógini fyri Føroyar at siga óviðkomandi frá nøkrum av tí, sum tað fær at vita um inntøku-, ognar-, og vinnuviðurskifti ella viðskifti, sum viðkoma heimalívinum hjá skattskyldugum ella ávísingarskyldugum, meðan tað røkir starv sítt sambært skattalógini.

Bæði landsstýrið og løgtingið eru í hesum sambandi at rokna sum óviðkomandi, og hevur landsstýrismaðurin tí ikki innlit í tey viðurskifti, sum spurt verður um.

Tinganes, 28. september 2022

Uni Rasmussen
landsstýrismaður í fíggjarmálum